# Nøvn

## Minningarorð um systur mína Mallu Hansen



Tað kom ikki brádliga á okkum at tú vart sjúk. Tú stríddist leingi við Parkinson sjúkuna, sum forðaði tær nógv likamliga, men hóast hesa sjúku og tær forðingar, hon hevði við sær, so bart tú tað stilt. Saman við hesi sjúku, fylgdi nógv annað við. Tú vart á Ríkissjúkrahúsinum, fyri at kanna búkspýtkertilin, sum voldi tær nógva pínu. Tú fekst at vita, at tað var ikki óndartað. Síðani hevur tú verið út og inn av sjúkrahúsinum, tá pínan hevur verið mest. Til seinast, einar 3 vikur, áðrenn tú legði árarnar inn, fekk tú at vita, at tað var óndartað og at ongin viðgerð kundi hjálpa tær.

Eg undraðist á, hvussu tú tókst boðini um, at onki var at gera og at tú onga hjálp kundi fáa. Tú vart so opin, sum tú ongantíð hevði verið fyrr. Tað tyktist, sum var ein byrða farin av tær. Vit prátaðu nógv saman tann dagin tú fekst boðini. Eg var so kedd um, at tú skuldi fara frá okkum so tíðliga, men tað var tú, sum troystaði meg. Tú segði, at tú vart ikki bangin fyri at doyggja, tí tú hvíldi í honum, sum tú hevði sett títt álit á, Harran Jesus, sum offraði seg fyri teg.

Tær hevur altíð dámt best at vera heima og passað heimið og tað, sum har til hoyrir. Tú hevur altíð verið har fyri børnini og mannin. Nú tú vart sjúk, vildi tú eisini verða heima, og vóru tey nærmastu um teg allatíðina, líka til ta seinastu løtuna. Tú vart so troytt, at tær longdist at sleppa burtur úr tí sjúka likaminum og heim til Harran. Malla, eg vil takka tær fyri tíðina vit høvdu saman, tað var altíð hugnaligt at verða saman við tær og tínum. Tú gleddist altíð, tá tað gekst børnunum væl. Serliga vart tú so glað nú tú vart blivin omma at tvillingunum, men tíverri kundi tú ikki vera so nógv fyri tey, sum tú hevði ynskt, orsaka av sjúkuni.

Náttúran er farin úr tí fríska grøna búnanum, sum er so lívsjáttandi og hevur nú latið seg í heystarbúnan við tí gula litinum, sum vísir okkum, at alt følnar, fyri síðani at spretta aftur av nýggjum. Menniskjalívið er eins og náttúran, ódnir og stormar koma á, men skiftast síðani til logn og lýðku. Menniskjalívið følnar, fyri síðani at rísa aftur í nýggjum og frískum likami.

Fyri teg var heystardagurin komin, har tú skuldi flyta heim eins og flytifuglurin flytir til heitari lond. Eftir tær, stendur roðin, sum minnir okkum á allar tær góðu løturnar saman. Minnini, sum tú hevur latið eftir tær, eru ein arvur, til okkum og gevur okkum styrki at ganga lívsins mangan torføru gongd.

Líggjas, Hendrik, Súsanna, Simona og Jákup, eftir stendur eitt tómt pláss eftir ein, sum fylti so nógv hjá tykkum. Harrin styrkir tykkum øll, ið eftir sita. Ein góð kona, mamma og omma er farin.

Við hesum orðum, lýsi eg frið yvir rík minnir um systur mína Mallu.

**Bina**





# 17 Sangarar og Jógvan Hansen sungu fyri full-settari Langholtskirkju

**UMRØÐA** Konsertferðin hjá 17 Sangarum saman við Jógvan Hansen í Reykjavík leygarkvøldið 2. oktober og orkestri var væl eydnað.

Dávur Winther
Myndir: Steinvør Fonn

Skráin var løgd tilrættis soleiðis, at fyrst sungu 17 Sangarar løg av Jógvan við Keldu, síðani kom Jógvan Hansen á pall saman við sínum orkestri, har ymisk løg vórðu framførd við Jógvani og hann saman við Pætur og Tóru við Keldu og Steinvør Fonn og eisini onkur løg saman við 17 Sangarum.

Eftir at Jógvan var liðugur, sungu 17 Sangarar aftur nøkur íslendsk løg, nakrar »evergreens«, hjá kenda tónaskaldinum Sigfúsi Halldórssyni, sum hevði fylt 90 ár í ár, og sum er heiðursborgari í vinarbýnum hjá Klaksvík, Kópavogi. Pætur hevði klaverfylgisspælið og saman við dugnaligum íslendskum orkestri til flestu løgini.

Jógvan við Keldu stjørnaði 17 sangarum á ferðini og tað sigst, at konsertin í Langholtskirkju endaði við standandi klappsalvum.

Sunnudagin sungu 17 Sangarar í samkomuni Akrinum í Kópavogi.

Síðani vórðu sangararnir heintaðir við bussi, har borgarstjórin Guðrun Pálsdóttir og mentanarfulltrúin Linda Udengárd vístu teimum partar av býnum.

Kórið sang síðani á einum nýggjum eldraheimi og eftir tað vitjaðu tey býarbókasavnið, náttúrugripasavnið og seinast tónlistasavn Íslands, har ein framsýning var til heiðurs fyri Sigfús Halldórssyni, har 17 sangarar sungu “Fusi-sangir”, sum eisini vórðu lagdir inn á heimasíðuna www.tonlistarsafn.is

Íslendingar vóru sera gestablíðir, sum altíð og møttu upp í Langholtskirkjuni í hópatali, har konsertin fekk gott skoðsmál.

Konsertferðin var væl stuðlað av: Atlantic Pelagic, FaroeShip, Norðopa Sparikassa, Reyni Service, Atlantic Airways, JFK, Klaksvíkar Kommunu, Mentanargrunni Landsins, KBI, VIKMAR, Kjølbro Heilsølu, sum kórið er takksamt fyri.